# Fiskasølan hevði nøktandi úrslit í fjør

**Í fjør fekk Fiskasølan nýggja nevnd og nýggjan stjóra**

FISKASØLA
*Vilmund Jacobsen*



*Um tað er nýggja "stategiin" hjá Fiskasøluni við nýggju leiðsluni - ella arbeiðið, sum tey undanfarnu hava gjørt, ið er atvoldin til góða úrslitið hjá Fiskasøluni í 2003, stendur ósvarað í ársfrágreiðing felagsins. Hákun Steingrímsson er nevndarformaður í Fiskasøluni*

Úrslitið av rakstrinum hjá Fiskasøluni í fjør var 5.655 milj. krónur fyri skatt - ella slakar 3 milj. krónur betur enn árið fyri, tá ið úrslitið var 2.929 milj. krónur. Skatturin hjá Fiskasøluni í 2002 var 2.200 milj. krónur og eftir, at skatturin er drigin frá, er ársúrslitið 3.455 milj. krónur.

Keldur innan fiskasøluverðina siga, at Fiskasølan í 2002 hevur avskrivað lutfalsliga stórar upphæddir uppá "goodwill". Ivi er um, hvussu neyðugt hetta er. Vórðu hesar avskrivingar ikki gjørdar, hevði úrslitið hjá Fiskasøluni verið enn betur.

Í ársfrágreiðing síni fyri 2002, sigur Fiskasølan, at "…úrslitið av rakstrinum hjá Samtakinum, áðrenn óvanligt er tikið við, vísti eitt yvirskot uppá 7.291 milj. krónur".

Lagt verður aftrat, at felagið í árinum 2002 gav eitt avkast uppá 8,5% fyri skatt í mun til eginpeningin við ársbyrjan.

- Við verandi fortreytum, sum felagið hevur at arbeiða undir, metir nevndin úrslitið vera nøktandi, verður sagt í ársfrágreiðingini.

### Nýggjur stjóri

Í september 2002 fekk Fiskasølan nýggjan stjóra.

Hans Jóhannes á Brúgv, sum hevur starvast innan føroyskt fiskasøluvirksemi í mong ár, varð uppsagdur, og í hansara stað kom Árni Arge. Framleiðslu-og innkeypsstjóri er Rógvi Reinert.

Tá ið Sosialurin í fjør heyst frætti, at Hans Jóhannes á Brúgv varð sagdur úr starvi, tosaðu vit við nevndarformannin í Fiskasøluni, Hákun Steingrímsson og fráfarandi stjóran.

Vit fingu onga veruliga frágreiðing um, hví Hans Jóhannes skuldi sigast úr starvi. Sosialurin skilti tó á Hákuni, at nevndin vildi hava annan mann at fremja nýggju "strategiina" hjá Fiskasøluni, sum hann tók til.

### Hans ella Árni

Í fjør hevði Fiskasølan so eitt av sínum bestu árum í nýggjari tíð.

Um úrslitið stendst av tí arbeiði, sum Hans Jóhannes legði úr hondum - ella nýggju "strategiini" hjá nýggju leiðsluni, hava vit ikki førleika at meta um í løtuni.

Nývaldir í nevndina í Fiskasøluni, 24. juni í fjør, vórðu Hákun Steingrímsson, Thomas Arabo og Johannes Jensen.

Hákun Steingrímsson er formaður og Thomas Arabo næstformaður..

# Fara helst at merkja aftur-gongd í ár

**Heimsbúskaparliga afturgongdin fer væntandi at raka føroyska útflutningin meinari í 2003, sigur Fiskasølan**

FISKASØLA
*Vilmund Jacobsen*

Fiskasølan sigur, at bæði fiskiskapur og marknaðarviðurskifti vóru góð í 2002, tá ið ráddi um okkara botnfiskavinnu.

- Fiskiskapurin undir Føroyum gjørdist metstórur í 2002, og prísstøðið á marknaðinum fyri botnfisk hevur sum heild verið høgt, hóast tað fall nakað í mun til árið frammanundan.

Víst verður á, at búskaparliga afturgongdin á høvuðsmarknaðum okkara ikki hevur rakt okkum so meint higartil.

- Men væntandi fara vit at merkja hetta í 2003, sigur Fiskasølan sum heldur, at heimsbúskaparliga afturgongdin væntandi fer at raka føroyska útflutningin meinari í 2003. Tískil eru marknaðarútlitini fyri botnfisk ikki eins góð sum fyri ár 2002, hóast alheimsútboðið av botnfiski í ár helst verður á sama støði sum í 2002.

Fiskasølan heldur, at prísstøðið fer at lækka nakað á flestu fiskasløgum.

### Saltfiskur og laksur

Fiskasølan eigur 25,5% av partapeninginum í P/F Vaðhorn Seafood á Strondum. Felagið, sum burturav framleiðir saltfiskafløk, hevði eitt metár í 2002.

Fiskasølan hevur eisini sett á stovn eitt dótturfelag í Fuglafirði, sum 6. januar í ár keypri rakstrartólini á Góðskingarvirkinum í Fuglafirði, ið P/F East Salmon átti. Síðan tá, hevur Fiskasølan staðið fyri rakstrinum av virkinum, ið framleiðir laksaportiónir. Umleið 40 fólk arbeiða hjá felagnum í Fuglafirði. Stjóri er Rógvi Reinert.

Rækjudeildin hjá Fiskasøluni í Hirtshals er niðurløgd, og verður øll søla av rækjum framd av høvuðsdeildini í Havn.

# Trupulleikar á rækju-og laksamarknaðinum

**Við atliti til torføru støðuna hjá rækjuflotanum, hevur Fiskasølan niðurskrivað virðini av partabrøvum í rækjuskipum. Fiskasølan eigur 30% í alifelagnum, East Salmon, men felagið hevði ikki - eins og flestu onnur alifeløg - hall í 2002**

FISKASØLA
*Vilmund Jacobsen*



*Fiskasølan hevur niðurskrivað virðir í partabrøvum hjá rækjuskipum. - Føroyska rækjuvinnan er sum heild í svárari kreppu, sigur felagið.*

*Mynd: Tilvildarlig*

Endamálið hjá Fiskasøluni er at marknaðarføra føroyskar og aðrar fiskavørur á altjóða marknaðinum, og málið hjá sølufyritøkuni er at vera fremsti útflytarin av føroyskt framleiddum fiskaúrdráttum til brúkarar í Evropu, USA og Fjareystri.

### Rækjuvinnan

Í ársfrágreiðing felagsins verður víst á, at marknaðurin fyri rækjur, bæði skalrækjur og pilkaðar rækjur, var - eins og í 2001 - sera vánaligur í 2002.

- Góði fiskiskapurin í Kanada og Grønlandi hevði við sær, at útboðið framvegis er størri enn eftirspurningurin. Saman við einum falli í dollaranum uppá 14%, hevur prísstøðið verið á einum lágum støði eftir metstóra prísfallið í 2001. Føroyska rækjuvinnan er tí sum heild í svárari kreppu.

Í sambandi við støðuna hjá rækjuflotanum, hevur Fiskasølan í ársroknskapinum fyri 2002 niðurskrivað virðini av partabrøvunum í P/F Vaðanes, sum eigur M/tr Ocean Pride, við 1 milj. krónum. Harumframt er meirvirðið í mun til innara virðið av partabrøvunum í P/F Líðini, sum eigur M/tr Arctic Viking, serniðurskrivað við 4,1 milj. krónum.

### Laksavinnan

Um laksavinnuna, sigur Fiskasølan, at her hevur prísstøðið á heilum feskum laksi verið javnt lágt, umleið 20 kr. fyri kg. Metingarnar hjá serfrøðingum um, at prísirnir fóru at hækka seinasta ársfjórðing í fjør, hildu ikki.

- Orsakað av lága prísstøðinum saman við fiskasjúkunum, serliga ILA, er alivinnan sum heild í kreppu.

Fiskasølan eigur 30% í alifelagnum, P/F East Salmon, men í mun til flestu alifeløg annars, hevði felagið ikki hall í 2002.

- Tískil tyngdi hetta virksemi hjá okkum ikki um roknskapin í 2002, sigur Fiskasølan.



# Intel áhugað í Føroyum

**Føroyar er eitt gott øki hjá stórum altjóða fyritøkum at royna nýggja tøkni, og tí skal Føroyar bjóða seg fram sum royndarøki. Intel hevur longu víst stóran áhuga í Føroyum**

TØKNIFRØÐI
*Stefan í Skorini*



*Micheal Paul Reveal stendur fyri altjóða samskiftinum í verkætlanini, og hann hevur havt samband við sjálvan varastjóran í Intel, Sean Maloney*

*MYND: Jens Kr. Vang*

Bitland verkætlanin fór av bakkastokki fríggjadagin seinnapart. Ætlanin við hesari verkætlan er at vita. um Føroyar kunnu gerast ein nýskapandi fyrimynd í gagnnýtslu av tøkni.

Fyrsta ráðstevnan ella Bittingið verður fríggjadagin, og tað er TK-stovan, sum skipar fyri.

### Intel á gáttini

Micheal Reveal, sum tekur sær av altjóða samskiftinum í verkætlanini, setti seg í samband við risastóru fyritøkuna Intel í USA. Hann kom í samband við sjálvan varastjóran í hesi fyritøku, sum eitur Sean Maloney.

Serliga er tað tráðleysa WiFi skipanin, sum er áhugaverd. Tann skipanin hevur verið roynd úti í Svínoy í eina tíð. Trupulleikin við WiFi skipanini er, at frástøða er ein forðing fyri at nýta WiFi.

Intel, sum er heimsins størsti framleiðari av prosessarum, hevur víst stóran áhuga í Bitland verkætlanini. Varastjórin í Intel heldur, at tað er sera áhugavert, at eitt heilt land fer undir eitt tílíkt átak, og teir fylgja væl við, hvussu verkætlanin gongur.

– Intel er áhugað í at fylgja gongdini í Føroyum, hóast teir enn einki hava sett í verk her á landi. Fyritøkan er serliga áhugað í at kanna, hvussu WiFi kann nýtast innan fiskivinnuna, sigur Micheal Reveal, sum setti gongd í alt maskinaríið.

Micheal Reveal sigur, at Intel hevur sett gongd í eina verkætlan í Spania, har milliónabýurin Zamora hevur fingið internetsamband yvir WiFi. T.v.s. at allir íbúgvarnir hava tráðleyst internet samband. Okkurt tílíkt kundi verið sett í verk í Føroyum.

### Bert byrjanin

Enn eru bert 650.000 krónur settar í hesa verkætlanina. Hetta er tó bert byrjanin, og um alt gongur eftir ætlan, verður næsta ráðstevnan seinni í ár.

Í verkætlanarbólkinum eru Steinbjørn í Dali, verkætlanarleiðari, Ólavur Ellefsen, tøkniligur ráðgevi og Micheal Paul Reveal, ið tekur sær av altjóða samskifti.

Verkætlanin er fíggjarliga stuðlað av Sparikassagrunninum, ENI, Føroyar Tele, Atlantic Airways, og harafturat veita KT-felagið og TK-stovan stuðul á annan hátt.

# 123 nýggj røktarheimspláss kring landið

**Sunnari partur av Eysturoynni fær komandi árini nøktað allan tørvin á røktarheimsplássum, eftir at kommunurnar har hava fingið stuðul frá landsstýrinum til 60 nýggj røktarpláss til eldri**

ELDRAØKIÐ
*Stefan í Skorini*



*Sæunn Ólavsdóttir Hansen er stýrisforkvinna í Eysturoyar røktar- og ellisheimi í Runavík. Landsstýrismaðurin við almanna- og heilsumálum, Páll á Reynatúgvu, hevur játtað stuðul til 60 nýggj pláss í hesum økinum*

Eingin ivi er um, at tað er sera stórur tørvur á bú- og røktarplássum til eldri fólk, og bíðilistarnir eru langir. Men nú tykist okkurt at henda á hesum økinum.

Tingið hevur játtað at lata tilsamans 57 milliónir krónur í studningslánum og íløgustuðli til bústaðir til eldri fólk. Nú hevur landsstýrismaðurin við almanna- og heilsumálum, Páll á Reynatúgvu, latið stuðul til tær kommunur, sum hava søkt um stuðul.

Heimarøktin er skipað í seks økir í landinum. Av hesum seks hava bert trý øki søkt um stuðul til útbygging av eldraøkinum. Vágar, Norðurstreymoy og Norðureysturoy fáa 37 nýggj pláss, Suðurstreymoy fær 26 nýggj pláss og Suðureysturoy fær 60 nýggj pláss.

Norðoyggjar, Suðuroy og Sandoy hava ikki søkt um stuðul frá landinum til at útbyggja eldrarøktina.

### 8 verkætlanir

Tilsamans átta verkætlanir fáa stuðul frá landinum. Landsstýrismaðurin hevur mett um tørvin í mun til tær ymsu verkætlanirnar, og síðani latið stuðul út frá hesum metingum.

Eitt røktarheim skal byggjast í Norðurstreymoy, har pláss verður fyri 32 búfólkum, eitt ellis- og røktarheim skal byggjast í Eysturoynni, sum skal hýsa 24 fólkum og eitt ellis- og røktarheim skal byggjast í Tórshavnar kommunu, har pláss verður fyri 10 búfólkum.

Harumframt skal eitt eldrasambýli byggjast á Eiði til 5 búfólk. Eitt eldrasambýli skal byggjast í Gøtu, har pláss verður fyri 10 búfólkum, eitt eldrasambýli á Toftum, har pláss verður fyri 16 búfólkum og eitt eldrasambýli í Leirvík, sum skal hýsa 10 búfólkum. Eisini verður eitt heim fyri minnisveik bygt í Tórshavnar kommunu, har pláss verður fyri 16 búfólkum.

Eftir ætlan eru hesar verkætlanir lidnar við árslok 2005, og tá skuldu 123 nýggj røktarpláss verið tøk til teir eldru borgararnar.

Páll á Reynatúgvu hevur givið tilsøgn um at lata slakar 40 milliónir krónur í stuðli. Sostatt eru enn 18 milliónir eftir av játtanini, sum er oyramerkt til eldraøkið.

Tí verður enn eitt umfar, har kommunur kunnu søkja um íløgustuðul ella studningslán til útbygging av eldrarøktini.

Einki nýtt ellis- og røktarheim er bygt, síðan røktar- og ellisheimið á Sandoynni varð tikið í nýtslu fyri ellivu árum síðani.

### Lógarbroyting

Løgtingið samtykti í mai í ár at broyta lógina um studningslán til ellis- og røktarheim. Endamálið við broytingini var at fáa heimild til at veita tilsøgn um studning til ellis- og røktarheim og eldrasambýli yvir um fíggjarár.

Løgtingið hevur nú bundið seg til at játta í minsta lagi somu upphædd á fíggjarlógunum fyri 2004 og 2005 sum fyri 2003.

Landsstýrið hevur heimild at lata studning uppá 500.000 krónur til hvørt búpláss, tó í mesta lagi helvtina av byggikostnaðinum.